# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

*– Vit eiga at hugsa okkum væl um, áðrenn vit leypa á Iran*

*Richard Armitage*

**STUTT SAGT**

## Vitjaði minnisvarða



*Koizumi hevur aftur fingið øði í kinesarar og suðurkoreanarar*

Japanski forsætisráðharrin, Junichiro Koizumi, vitjaði í gjár ein minnisvarða frá seinna heimsbardaga, sjálvt um bæði Kina og Suðurkorea høvdu mælt honum frá at gera tað.

Hetta er fimta árið, at Koizumi vitjar tann umstrídda Yasukumi-minnisvarðan, sum varð reistur til minnis um teir japanarnar, sum blivu dømdir fyri krígsbrotsverk undir seinna heimsbardaga, men hetta er fyrstu ferð, at hann hevur vitjað minnisvarðan tann 15. august, sum var dagurin, tá Japan gav seg yvirv í 1945.

Myndugleikarnir í Kina og Suðurkorea hava mótmælt øll fimm árini, tí teir vilja vera við, at minnisvarðin heiðrar framferðini hjá japanska herinum undir heimsbardaganum, sum kostaði 2,5 milliónum japanarum lívið.

## Mánamyndir horvnar

Tey, sum eru komin so mikið upp í árini, munnu minnast myndirnar av teimum báðum fyrstu rúmdarmonnunum, sum spákaðu á Mánanum, men nú skrivar blaðið The Daily Telegraph, at amerikanska rúmdarumsitingin NASA hevur mist upprunamyndirnar burtur.

Tað hevur vakt stóran ans, tí í rúmdarheiminum vórðu upprunamyndirnar mettar sum ein sannur fongur, ið skuldi goymast væl. Kortini eru myndirnar ikki at finna í dag, og tað verður mett sum ein sonn vanlukka. Sambært The Daily Telegraph hevur leiðslan í NASA sett fólk at leita eftir myndunum, og tað seinasta er, at tær eftir øllum at døma liggja onkunstaðni í Goddard Space Flight Centre í statinum Maryland. Ein talsmaður hjá NASA viðgongur, at talan er um grovt ósketni, men hann ivast í, at tað fer at bera til at finna myndirnar aftur ímillum øll skjøl og annað frá teimum seinastu 35 árunum.

Tær fyrstu myndirnar av fólki á Mánanum vóru rættiliga kámar, og serfrøðingar siga, at upprunamyndirnar høvdu givið eina nógv klárari mynd av Mánanum og teimum báðum rúmdarmonnunum. Men verður upprunafilmurin ikki funnin aftur, fáa vit ongantíð tær veruligu myndirnar at síggja, skrivar The Daily Telegraph.

## Nýggj skip til Íslands

Solstrand-skipasmiðjan í Tomrefjord í Noregi hevur skrivað undir sáttmála við eitt íslendskt reiðarí um at byggja tveir frystitrolarar, skrivar Sunnmørsposten.

Trolararnir verða 70 metrar langir og hava manningarrúm til 32 fólk. Tann fyrri skal latast reiðarínum á Siglufirði í november næsta ár og tann seinni í apríl í 2009. Íslendska reiðaríið hevur seks skip frammanundan. Einki verður sagt um, hvat teir báðir trolararnir fara at kosta, men Sunnmørsposten skrivar, at hetta er tann størsti einstaki sáttmálin, sum Solstrand-skipasmiðjan nakrantíð hevur gjørt.

Tey flestu skipini, sum verða bygd á norskum skipasmiðjum, hava samband við oljuvinnuna, og á Solstrand-skipasmiðjuni siga tey seg vera sera fegin um at sleppa at byggja teir báðar trolararnar til Íslands.

# Hon jagstrar al-Qaeda

**Bretska trygdartænastan MI5 hevur vunnið ein stórsigur í bardaganum ímóti altjóða yvirgangi. Á ovastu rók í tænastuni situr ein kvinna.**




Í dag er Eliza Manningham-Buller 58 ára gomul. Eingin veit við vissu, hvussu leingi hon hevur arbeitt fyri MI5, tí slíkt verður ikki almannakunngjørt, men hildið verður, at tænastan setti seg í samband við hana longu í 1971, tá hon gekk á lærda háskúlanum í Oxford. Hon tók kortini ikki av, men arbeiddi sum lærari í trý ár, til hon fór upp í MI5 í 1974.

Tað kalda kríggið var í hæddini um tað mundið, og Eliza varð sett av skriva avlurtaðar telefonsamrøður hjá diplomatum úr teimum eysturevropeisku londunum. Men hennara nærlagni og ágrýtni gjørdu, at longu tíðliga varð hon sett til at avdúka fremmandar njósnarar. Hon bleiv sett at leiða mótnjósningina móti Sovjetsamveldinum, og í hesum starvi lærdi hon, at tað týdningarmesta hjá tí, sum jagstrar njósnarar, er at duga at tiga. Soleiðis var tað millum annað henni og hennara dygdum fyri at takka, at sovjetskir njósnarar í London eisini kundu njósnast fyri Bretland ímóti teirra egna landi, uttan at Kreml óraði ilt.

Seinni bleiv Eliza Manningham-Buller flutt á deildina, sum skuldi taka sær av yvirgangi. Hon var við til at kanna vanlukkuna, tá agentar úr Libya sprongdu eitt flogfar uppi yvir Lockerbie í Skotlandi. Seinni bleiv hon sett til at kanna virksemið hjá IRA, og aftan á atsóknirnar at USA í september í 2001 varð hon sett til at jagstra al-Qaeda. Árið eftir gjørdist hon onnur kvinnan í ovasta starvinum í MI5.

### Sjónlig

Sum stjóri í bretsku trygdartænastuni hevur Eliza Manningham-Buller verið meiri sjónlig enn hennara undanmenn, og hon hevur eisini gjørt MI5 meiri sjónliga. Eitt nú er tað henni fyri at takka, at vit í dag kunnu fara inn á heimasíðuna hjá MI5 og kunna okkum um, hvussu stórur vandi er fyri yvirgangi í Bretlandi.

Bara tað, at tænastan hevur eina heimasíðu, er ein kollvelting í sjálvum sær, tí fyri bara tjúgu árum síðani høvdu bretsku myndugleikarnir ilt við at viðganga, at tað yvirhøvur var nakað, sum æt MI5.

Almenningurin veit lítið um Eliza Manningham-Buller. Vit vita, at hon eigur eingi børn, men at hon er gift manni, sum eigur fimm børn. Hvussu maðurin eitur til eftirnavn er eitt loyndarmál, men sambært bretskum fjølmiðlum er tað neyvan av tilvild, tí tað sigst, at hann var sera vinstrahallur sum ungur.

# Ísrael hevði fyrireikað kríggið við Hizbollah

**Amerikanska stjórnin visti um fyrireikingarnar, tí kríggj við Hizbollah kundi geva týðandi upplýsingar um eitt møguligt kríggj við Iran**

Í fleiri mánaðir hevði Ísrael fyrireikað seg til at leypa á Hizbollah, og amerikanska umsitingin var við í fyrireikingunum.

Álopið hjá Hizbollah á eina ísraelska marknastøð gav Ísrael eina orsøk til at fara undir álopið, men tað hevði komið kortini.

Tað skrivar tann kendi amerikanski tíðindamaðurin Seymour M. Hersh í blaðnum New Yorker. Hann sigur seg hava fingið at vita frá keldum í Bush-umsitingini, at amerikanskir og ísraelskir diplomatar høvdu nógvar fundir um tað ætlaða álopið, og at amerikanarar sýndu ísraelsku ætlanini stóran áhuga. Tað komst av, at í amerikonskum eygum kundi eitt álop á Hizbollah geva fleiri týðandi upplýsingar, sum kundu koma USA til góðar í einum møguligum álopi á Iran. Eitt nú hevði Hizbollah fingið vápn úr Iran, og iranskir yvirmenn høvdu vant Hizbollah-hermenninar. Harafturat kom, at eftir uppskoti úr Iran hevði Hizbollah gjørt sær fleiri støðir og tunlar undir jørð, og tí hildu amerikanararnir, at iranski herurin helst hevur gjørt tað sama.

Spurningurin er nú, um úrslitið av ísraelska álopinum á Hizbollah eggjar USA til at leypa á Iran, skrivar Simon Hersh. Hann var lutvíst svar frá Richard Armitage, sum er fyrrverandi varauttanríkisráðharri hjá George W. Bush, forseta.

– Tá Ísrael ikki klárar at gera av við eitt so lítið land sum Libanon, eigur ein at hugsa seg væl um, áðrenn ein leggur á eitt land, sum er nógvar ferðir størri og hevur 17 ferðir meiri fólk, sigur Richard Armitage við New Yorker.